52-025/2026

VINNUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF TRADE AND INDUSTRY

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 8. september 2026
Mál.: 26/21049
Viðgjørt AE
Tygara skriv: 52-012/2026

**Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-025/2026 frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í vinnumálum, Jacob Vestergaard, um kostnað av tunnilsbygging á landi**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvør er samlaði kostnaðurin av Dalstunlinum?
2. Hvør er kostnaðurin av Dalstunlinum samanborið við aðrar tunlar, ið eru bygdir á landi seinastu 8-9 árini (Fámjinstunnilin, Hvalbiartunnilin og tunlarnir Norður um Fjall)– fyri hvønn metur/kilometur og onnur saklig og sambærlig metingarvirði?
3. Hvussu nógv av kostnaðinum í Dalstunlinum er goldin til almennar veitarar og hvussu nógv til privatar veitarar samanborið við hinar tunlarnar, sum eru bygdir seinastu 10 árini?
4. Í rundum tølum, hvussu nógv er goldið til størstu veitararnar og hvørjar tænastur hava hesir veitt verkætlanini – í neyvari samanbering millum Dalstunnilin og hinar tunlarnar seinastu 10 árini?
5. Hvussu nógv av samlaða kostnaðinum av Dalstunlinum samanborið við hinar tunlarnar er goldið til útlendskar veitarar?
6. Nær er ætlanin, at arbeiðið við Tjørnuvíkartunlinum fer í gongd, og hvussu verða tøl og royndir, sum spurt er um omanfyri, brúkt til at taka avgerð um, hvussu Tjørnuvíkartunnilin (og seinni Gjáartunnilin) skulu gerast?

**Svar til spurning 1**
Dalstunnilin var liðugur og tikin í nýtslu 18. juli 2026. Dalbingar hava fingið eina góða farleið, sum lýkur øll nútíðar krøv til dygd, trygd og framkomuleika.

Landsverk hevur lagt til rættis og staðið fyri verkætlanini. Tunnilstoymið hjá Landsverki hevur borðað og sprongt tunnilin. Arbeiðið hevur verið skipað sum fakarbeiðstøkur við eini røð av føroyskum feløgum sum veitarar.

Nýggja farleiðin til Dals kostar umleið 180 mió. kr. og nógv er komið búrturúr. Tunnilin er 2,2 km. langur, 500 m av vegi er dagførdur í Dali, og 2,5 km av vegi er dagførdur í Húsavík. Umleið 500 m av nýggjum vegi er gjørdur á Skálavíkarvegnum, og eitt stórt sving er eisini umlagt á Skálavíkarvegnum.

Landsverk keypti tunnilsútgerð fyri 13,7 mió. kr.

**Svar til spurning 2**
Tað er trupult at samanbera tunnilsverkætlanir, tí viðurskiftini eru ymisk frá tunli til tunnil. Viðurskifti, sum hava týdning, eru eitt nú, hvussu nógv vegagerð er neyðug uttanfyri tunnilin, og um talan er um nýgerð av vegi ella breiðkan av verandi vegi. Eisini hevur tunnilsprofilurin, tilfarið í berginum, tørvurin á tekniskari útgerð, og møguleikarnir fyri at sleppa av við tunnilsgrótið týdning.

Talva 1

| | Hvalbiartunnil | Norður um Fjall | Fámjinstunnil | Dalstunnil |
|---|---|---|---|---|
| Byggiár | 2019-2021 | 2021-2024 | 2022-2025 | 2020-2026 |
| Tunnil, longd | 2,524 | 4,089 | 1,200 | 2,219 |
| Vegir, longd | 3,300 | 1,850 | 1,550 | 3,250 |
| Tunnilsbreidd | 9 | 9 | 9 | 8 |
| **Samlaður kostnaður** | **269,2 mió kr** | **529,2 mió kr** | **275,6 mió kr** | **180 mió kr** |
| Fyrireikingarkostnaðir | 5,8 mió kr | 7,8 mió kr | 6,6 mió kr | 4,3 mió kr |
| Tunnils- og vegaarbeiði | 243,4 mió kr | 467,3 mió kr | 248,7 mió kr | 150,6 mió kr |
| El-Arbeiði | 12,1 mió kr | 36,5 mió kr | 7,8 mió kr | 11,8 mió kr |
| Uttanhýsis eftirlit | 5,7 mió kr | 6,6 mió kr | 6 mió kr | 1,8 mió kr |
| Byggiharraútreiðslir | 2,2 mió kr | 11 mió kr | 6,5 mió kr | 11,5 mió kr |

Talva 1 vísir eitt yvirlit yvir tunnilsverkætlanirnar, umframt byggiár, tunnilslongd, vegalongd og tunnilsbreidd. Talvan vísir eisini samlaðar útreiðslur og útreiðslurnar lutaðar á fyrisitingarkostnað, tunnils- og vegaarbeiði, el-arbeiði, eftirlit og byggiharraútreiðslur.

Landsverk skilir ikki ímillum tunnilsgerð og vegagerð, tá útreiðslurnar verða bókaðar í sambandi við nýggja farleið. Tí skal ein samanbering gerast við fyrivarni, men tað ber til at siga, at Dalstunnilin hevur verið lutfalsliga bíligur.

Viðmerkjast skal, at kostnaðurin fyri tunlarnar Norður um Fjall ikki er endaliga gjørdur upp, tí Landsverk og arbeiðstakarin eru ikki á einum máli um ávísar útreiðslur.

Fámjinstunnilin var sera kostnaðarmikil orsakað av jarðfrøðiligu viðurskiftunum á staðnum, og tí kann kostnaðurin ikki samanberast við hinar tunlarnar.

**Svar til spurning 3**
Útreiðslurnar til privatar veitarar vóru umleið 74% í sambandi við Dalstunnilin, og eini 96% í sambandi við hinar tunnilsverkætlanirnar. Talva 2 vísir býtið millum privatar og almennar veitarar á ymsu verkætlanunum.

Talva 2

| | Hvalbiartunnil | Norður um Fjall | Fámjinstunnil | Dalstunnilin |
|---|---|---|---|---|
| Privatir veitarar | 94% | 98% | 96% | 74% |
| Almennir veitarar | 6% | 2% | 4% | 26% |

**Svar til spurning 4**
Í Dalstunlinum eru 9 privatir veitarar, ið hava fingið útgoldið meir enn 5 mió. kr. Talva 3 niðanfyri vísir, hvørjir veitararnir vóru, umframt upphædd og arbeiðslýsing:

Talva 3

| Veitari | Upphædd | Arbeiðslýsing |
|---|---|---|
| SP/F Kaj Andreasen | 16 mió kr | Levera spreingievni v.m. |
| NCC Føroyar | 16 mió kr | Borifólk v.m. |
| P/F El-Service | 15 mió kr | El verkætlan |
| SP/F Finnleif Fagradal | 14 mió kr | Lastbilakoyring v.m. |
| SP/F H.J. Asfalt | 11 mió kr | Asfaltsarbeiði |
| SP/F Thomsen | 8 mió kr | Lastbilakoyring v.m. |
| SP/F J&K Betong | 8 mió kr | Veiting av betong |
| SP/F Norcon | 7 mió kr | Gjørt portalar |
| P/F Articon | 7 mió kr | Planera vegbanan í tunlinum |

Í hinum tunnilsverkætlanunum er ein høvuðsarbeiðstakari í hvørjum einstøkum føri. Tískil er meginparturin av kostnaðinum goldin til viðkomandi feløg.

Talva 4

| | Hvalbiartunnil | Norður um Fjall | Fámjinstunnil | Arbeiðslýsing |
|---|---|---|---|---|
| P/F Articon | 324 mió kr | 545 mió kr | | Høvuðsarbeiðstakari |
| P/F J&K Petersen | | | 300 mió kr | Høvuðsarbeiðstakari |
| P/F El-Service | | | 10 mió kr | El verkætlan |
| P/F LBF | 9 mió kr | 12 mió kr | 9 mió kr | Prosjektering og eftirlit |

**Svar til spurning 5**
Sum tað sæst á talvu 3 omanfyri, er bert ein fyritøka útlendsk, ið fekk útgoldið meir enn 5 mió. kr. í sambandi við Dalstunnilin. Um listin var longri, so hevði næsta útlendska fyritøkan ikki komið á listan fyrr enn á 21. plássi. Samanlagt eru umleið 20 mió. kr. útgoldnar til útlendskar fyritøkur.

Fyri hinar tunnilsverkætlanirnar er tað høvuðsarbeiðstakarin, sum ger avtalur við undirveitarar av vørum og tænastum. Landsverk avroknar bert við høvuðsarbeiðstakaran, og tí ber ikki til at síggja, hvussu stórar útreiðslurnar vóru til útlendskar veitarar.

**Til spurning 6**
Royndirnar frá Dalstunlinum eru góðar. Farleiðin er væl gjørd, og tunnilin er lutfalsliga bíligur. Føroysk arbeiðsmegi hevur luttikið í arbeiðinum, og arbeiðið við Dalstunlinum hevur verið skipað sum fakarbeiðstøkur við eini røð av føroyskum feløgum sum undirveitarar.

Støða skal takast til, um Tjørnuvíkartunnilin skal gerast eftir sama leisti, sum Dalstunnilin, har Landsverk og tunnilsliðið skulu standa á odda fyri verkætlanini og bora tunnilin, ella um øll tunnilsverkætlanin skal verða boðin út til byggifyritøkur.

Landsstýrið arbeiðir í løtuni við íløguætlanini, og landsstýrismaðurin metir tað vera umráðandi, at Tjørnuvíkartunnilin verður raðfestur. Tjørnuvíkartunnilin er liðugt prosjekteraður og klárur at bjóða út.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður